# Reglugerð
# fyri
# MáF-grunnin

§ 1
Grunnurin er stovnaður av Meginfelag áhugaleikara Føroya.
Upprunaliga stovnsfæið í grunninum er tær peningagávur, ið vórðu lætnar felagnum í 2001 við jarðarferð Sverra Egholms.

§ 2
Endamál grunsins er at stuðla áhugaleiklistini, við serligum atliti til føroyskt upprunatilfar.

§ 3
Nevnd Meginfelag áhugaleikara Føroya umsitur grunnin, og avger hon árliga, um peningur verður latin úr grunninum og til hvørji tiltøk, feløg ella persónar.
Tað ber ikki til at søkja um stuðul úr grunninum.

§ 4
Felagið letur árliga í grunnin eina upphædd av teimum inntøkum, ið felagið fær uttanum stuðul til raksturin, tiltøk og áhugaleik annars. Henda upphædd verður góðkend av ársaðalfundi felagsins.
Stovnspeningurin saman við teirri upphædd, sum kemur aftrat, skal standa í peningastovni við hægstu rentu.

§ 5
Roknskaparár grunsins er fíggjarárið.
Roknskapurin verður grannskoðaður av grannskoðara felagsins.

§ 6
Broytingar í skipanini kunnu bert gerast á aðalfundi hjá Meginfelag áhugaleikara Føroya.

Soleiðis samtykt á ársaðalfundi hjá Meginfelag áhugaleikara Føroya 5. apríl 2003.

*Hilmar Joensen*
*formaður*

*Birita Krossteig*
*næstformaður*

*Jógvan Ravnsfjall*
*kassameistari*

*Marita Øre*
*nevndarlimur*

*Aksel Joensen*
*nevndarlimur*